## DAGSINS MEINING

# Fuglfirðingar og brasilanar vunnu

Vikuskiftið hevur verið merkt av ymsum hendingum úti sum heima, ið hava stóran týdning fyri okkum øll. Í Japan megnaðu teir fótfimu brasiliansku fótbóltsspælararnir at taka allan heimi á bóli og vinna heimsmeistrakappingina fyri fimtu ferð, eitt stórbragd, sum neyvan verður gjørt teimum eftir. Ein hending, sum ikki bert verður væl móttikin í heimlandinum, men sum uttan iva fer at skapa enn størri áhuga kring allan heim fyri tí vakra og listarliga fótbóltsspælinum, sum nettupp Brasilia hevur megnað at framleiða og menna. Hóast mangir føroyingar settu sína vón til, at týska fótbóltsmaskinan fór at vinna, tí hetta vildi givið okkum ein ókeypis ferðaseðil til at spæla móti heimsmeistarunum í oktober, so mundi tað kortini frøða mangt fótbóltshjartað, at tað nettupp var tað flotta og fima fótbóltsspælið, ið vann, tá avtornaði. Brasilia stendur fyri nøkrum av tí besta fótbóltsspælinum, sum finst, og tí var tað gott fyri fótbóltin, at landið vann HM.

Fyri okkum føroyingar hevur hetta HM serstakan týdning, tí vit frammanundan eru komin í bólk saman við øðrum finalistinum, Týsklandi, í undanspælinum til EM í fótbólti. Sjálvandi hevði tað verið eitt plettskot at skula møtt einum nýbakaðum heimsmeistara í EM-undankappingini. Men at vit kortini skulu møta varaheimsmeistarunum úr Týsklandi, sum eisini eigur trý HM-heiti í sínum skjøldri er so avgjørt ein stórhending, ið ikki kann metast við nakra aðra í okkara ungu altjóða fótbóltssøgu. Og tað er greitt, at hóast øll hagtøl og allur logikkur sigur okkum, at vit kunnu fáa stórtap í slíkum dysti, so livir alla tíðina vónin um at kunna skapa eina Senegalesiska sensatión, sum tá hetta liðið vann á heimsmeistarunum úr Fraklandi. Ella vit kunnu endurtaka sigurin á Eysturríki, sum vakti miklan ans í fótbótlsheiminum. Men um so er at vit skulu hava vón um eitt heiðurligt úrslit móti Týsklandi um tríggjar mánaðir, so má okkara landslið skjótast tilber fara undir intensiva venjing. Sum áður nevnt á hesum stað halda vit tað hevði verið rætt, um landið setti pengar av til slíka venjing, soleiðis at vit vóru 100% fyrireikaðir til henda okkara aldarinnar dyst.

Ein onnur stórhending, ið fór fram í vikuskiftinum, og sum hevur meira beinleiðis týdning fyri okkum, var tá nýggja og stásiliga mentanarhúsið í Fuglafirði varð tikið í nýtslu. Hugaligt at síggja, hvussu nógvir fuglfirðingar vórðu savnaðir at heiðra húsið, tá tað varð alment tikið í nýtslu fríggjakvøldið. Eins og fótbólturin hevur nógv at siga fyri mong av okkum, so hevur mentanin tað so sanniliga eisini fyri mong onnur. Við nýggja mentanarhúsinum hevur ikki bert Fuglafjørður fingið eitt tignarligt og anvendeligt forum men øll Eyturoyggin og Føroya land. Nú er bara at vóna, at øll búpláss í oynni kenna hetta hús sum sítt og fara at brúka tað. Gott í tykkum í Fuglafirði, sum hava fingið hetta megnar hús upp at standa. Tit hava her skapt ein karm til allar eysturoyingar at brúka fyri ikki at tosa um allar føroyingar. Við tunlunum verður mentanarhúsið í Fuglafirði skjótt eitt hús fyri bæði norðingar og vágafólk eisini.

Seinasta vikuskiftið fer at verða eitt av teimum minniligu, tí tað var tá, at Fuglfirðingar fingu sítt mentanarhús og fótbóltsheimurin fekk sín ynskiheimsmeistara, Brasil. Jú bæði Fuglafjøður og Brasilia vunnu týðandi sigrar seinasta vikuskiftið. Tillukku.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Festibóndin - er almennur stjóri

**Birgir W. Høgnesen**



**Kunnu stjórarnir á Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu fáa sínar fyritøkur ókeypis?**

Í tíðindasendingini hjá ÚF 11. og 14. juni var bóndin í Koltri ógvuliga vísur í, at hann hevði teir politisku flokkaranar á síni síðu, og hann helt fyri vist, at landsjørðin fór at verða givin burtur til bøndurnar.

Uppá fyrispurning til Føroya Jarðaráð verður svarað, at 400 festibøndur skylda 125 mill. kr. til Føroya Jarðaráð. Hesir festibøndur hava alt frá nøkrum fáaum gyllin til 20 merkur.

Nøkulunda um somu tíð, sum stjórin í Føroya Banka var settur at umsita landsins ogn, yvirtók ein ávísur bóndi eitt festi (landsjørð) at umsita. Hann skuldi verða stjóri á garðinum hjá landinum.

Bankastjórin hevur við sínum virkispolitikki latið avkast (vinningsbýti) til landskassan, upp til eina milliard krónur síðani hann kom til. Bankastjórin fær sína føstur løn, men so heldur einki meir.

Bóndin, sum bleiv settur sum stjóri á landsjørðina, hevur lánt pening upp á "okkara" jørð og avkastið kann hann brúka, um hann vil persónliga. Greina út kunnu vit siga, at bóndin tekur lán uppá "okkara jørð", sáar veltir, og selur mjólkina, eplini, o.a. Penginum kann hann rinda lánini við, men úrslitini vísa nakað annað.

Vitandi um, at skuldin hjá bóndrunum nú er komin uppá 125 milliónir, sigur tað seg sjálvt, at garðarnir eru riknir uttan mál og mið. Tó skal sigast, at tað eru undantøk, har festigarðurin er rikin fyrimyndarliga og enntá rindar fyri tvey ársverk og næstan uttan lán.

**Ikki uppá tal**

At skuldin nú skal avskrivast og bøndurnir skulu hava garðarnar til gávus, eigur ikki at koma uppá tal. Tað skilaloysið, sum hevur valdað á festijørðini átti heldur at fingið avleiðingar fyri festibóndirnar. Við hálvum eyga sæst, at bóndin ikki hevur røkt sínar skyldur, tí skuldin til Føroya Jarðaráð bara veksur, og máttloysið valdar í politiska systeminum, hjá bóndanum og hjá Føroya Jarðaráð.

Bankastjórin var helst valdur út eftir útbúgving, royndum og úrslitum, hann kundi vís á. So vítt fólk vita um, so hevur nøkur upptøkuroynd ongantíð verið, gjørd tá ið garðar skifta eigara, t.v.s. fær nýggjan stjóra. Tá ið garður skal yvirtakast er tað ein sjálvfylgja, at næsti maður í familjuni tekur yvir. Men hvørjar eru kvalifikatiónirnar, jú hann er í flestu førum sonur "gamla" bóndan, og so tað nóg mikið.

Ein persónur, sum hevur útbúgving úr Íslandi, sum búfrøðingur (á donskum landbrugskandidat) kundi saktans kvalifiserað seg til at yvirtykið ein miðal bóndagarð í Føroyum, ja vit kundu farið so langt, at slaktarin í SMS eisini hevur kvalifikatiónirnar. Tað at taka lán, velta bøin, og stórt sæð ikki rinda fyri lánini, kunnu øll gera. Ímyndið tykkum hvørji ágóðar bankastjórin kundi farið avstað við, um hann hevði somu treytir sum festibóndin í dag.

**Bóndagarðarnir eru fólksins ogn**

Á jøvnum føti við fiskiríkidømi, er okkara landbúnaðarjørð eisini fólksins ogn.

Um vit tosa um vinnutól, so keypir t.d. skipaeigarin sjálvur síni vinnutól, brúkar veiðu-rættindini og rindar fyri tað lán, hann hevur tikið uppá bátin. Bóndin í útvarpinum segðið, at hann roknaði við, at garðarnir blivu latnir bøndrunum til gávus um ikki so langa tíð, tí tað stóð í lánbúnaðarálitinum.

Torir bóndin at siga føroya fólki hvussu stór skuldin hjá hvørjum einstøkum garði er, sum teir sjálvir hava lánt upp um skorsteinin. Júst festibóndirnir hava prógva, at teir ikki er førur fyri at reka vinnutólið (garðin), tí hann klárar ikki at rinda skuldina aftur. Bóndagarðarnir eru fólksins ogn, og í samgonguskjalinum stendur:

"Almennar fyritøkur kunnu, um Løgtingið samtykkir tað, selja ella skipa fyri nýtekning av partabrøvum, sum verða boðin út - lutvíst sum starvsfólka-partabrøv, til almenningin og/ella til strategiskar íleggjarar. Málið er, at landskassin fær sum mest burturúr, og at selt verður til hægstbjóðandi."

Sum tað sæst, so ynskir politiska skipanina at fáa sum mest burturúr, um seljast skal, men tað hevur bóndin í úvarpinum ikki nevnt við einum orði.

**Mjólka mjólka og aftur mjólka:**

Nú er nóg leingi mjólkað, og halda bóndurnir ikki tátt, um at garaðarnir skulu "einskiljast" til teir sjálvar fyri einki, so eru teir til tað turra grin. Hvat sigur bóndin í útvarpinum til, at stjórarnir á Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu fáa sínar fyritøkur ókeypis, nei her er helst galdandi, at hetta er ikki tað sama vit tosa um. Jú, vit tosa um eiskiljing har landsins ogn verður boðin út til hægstbjóðandi. Hví skal garðurin hjá festbóndrunum ikki bjóðast út - nei, nú er nokk mjólka. Metodurnar hjá Mugabe í Zimbabwe, at rudda teir hvítu av gørðunum við skotvápnum, eru forkastiligar. At teir føroysku bóndurinir vilja lóggeva seg til garðarnar er eisini forkastuligt, tí hetta er rán av landsins ogn.

Nei. minnist nú til, at tit eru almennir stjórar á landsogn, og tit hava ikki persónligan rætt til almennu ognina heldur enn stjórin á t.d. Skógrøkt Landsins, Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasølu, Atlantic Airwais, Føroya Tele og stjórin á Royndarstøðini/Alm.Royndir í Kollafirði.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Faroe Connector fer úr flotanum



*Faroe Connector fer nú aftur undir danskt flagg. Avtalan millum Esvagt-Thor og BP fór úr gildi 1. juli, og BP var ikki sinnað at endurnýggja hana*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Stóra veitingarskipið hjá Esvagt-Thor í Hósvík fer úr flotanum og aftur undir danskt flagg. Útlitini í føroysku oljuvinnuni eru ov ótrygg í løtuni, sigur reiðarin**

ÚTFLAGGING
*Edvard Joensen*

Faroe Connector fer nú aftur undir danskt flagg. Manningin fylgir við og fer undir DIS. BP var ikki sinnað at endurnýggja avtaluna millum feløgini um at hava skipið í sigling.

Stóra veitingarskipið Faroe Connector hjá felagnum Esvagt-Thor í Hósvík fer nú aftur undir danskt flagg. Skipið verður skrásett í Esbjerg og fer helst at fáa gamla navnið, Esvagt Connector, aftur, sigur Gunnbjørn Joensen, stjóri á P/F Thor í Hósvík, sum er føroyski parturin av felagnum Esvagt-Thor.

Hann sigur, at útlitini komandi árið eru ov ótrygg til, at tað kann loysa seg at hava skipið skrásett í Føroyum til at liggja á spotmarknaðinum. Til tess krevst ov nógvur bundin kapitalur, at tað kann bera til, sigur hann.

Hinvegin hevur Esvagt, sum er danski parturin av Esvagt-Thor, betri møguleikar at hava skipið til arbeiðis, tí tað felagið hevur avtalur ymsastaðni.

Esvagt-Thor hevði avtalu við bretska oljufelagið BP, sum galdandi var fram til 1. juli í ár. Men BP var ikki sinnað at leingja ta avtaluna, og er hon tí farin úr gildi í gjár, sigur Gunnbjørn Joensen.

Hann metir grundina vera, at seinasta árið var ikki nakað serligt hjá BP. Tað hava verið 24 mans við Faroe Connestor. 12 á hvørji vaktini. Teir fara at fylgja við skipinum, hóast tað nú fer undir danskt flagg. Manningin fer so undir DIS skipanina, sigur reiðarin.

Tó fer onkur einstakur burturav, sum hevur fingið annað starv, sigur hann. Men alt í alt munnu einir 18-20 mans fylgja við skipinum. Teir fara eisini í stóran mun at verða verandi umborð á sama skipi, men kunnu tó koma út fyri at skula skifta í millum skip hjá Esvagt. Esvagt hevur sáttmálar ymsastaðni í heiminum.

Og tað hevur Thor í Hósvík eisini. Í løtuni røkkur virksemið hjá skipunum hjá Thor alt frá svartkalvafiskiskapi undir Føroyum, til frálandavinnu úr Singapore.

Eitt skip er á veg norður eftir úr Gabon. Eitt er í vinnu í Egyptalandi. Eitt er í Singapore, og tvey eru í Norðsjónum.

Umframt er so garnaskipið Thor, sum fiskar svartkalva undir Føroyum. Thor hevur verið í Danmark til sandblásingar í ein mánaða í summar, sigur Gunnbjørn Joensen. Hann hevur nú gjørt einar tríggjar túrar, síðan hann kom aftur, men fiskiskapurin hevur verið heldur slakur.

– Men tað er ikki annað væntandi, heldur reiðarin, tí hetta er ringasta tíð til svartkalva, letur hann at.

# Bygdarmynd broytist



*Stóra høsnahúsið í Rituvík verður nú tikið niður. Húsið var í ringum standi og til ampa fyri grannarnar. Høsnahúsið stendur á søguligum stað í Rituvík. Í húsinum til høgru á myndini búðu Per og Nicolina Højgaard, ið sum tey fyrstu settu búgv í Rituvík jólaaftan 1873*

*Mynd Edvard Joensen*

**Stóra høsnahúsið í Rituvík verður nú partvís niðurtikið. Stóra høllin, sum sjónsk var langt burtur, fer nú at hvørva**

BYGDARMYND
*Edvard Joensen*

**Rituvík:** Kenda høsnahúsið í Rituvík verður skjótt søga. Stórir partar av veggjum og taki eru longu niðurtikin, og stálkonstruktiónin veðru tikin niður í næstum.

Tað eru fýra brøður, ættaðir úr Rituvík, sum hava keypt høsnahúsið við tí fyri eyga at taka tað niður.

– Grundin er, sigur Áki Højgard, sum er ein teirra, sum keypt hevur og granni hjá høsnahúsinum, at tað var vorðið ov ótrygt at hava tað standandi har. Farið var at fúka burturav, sigur hann, so teir hildu best vera at fáa tað beint av vegnum, áðrenn tað gjørdi skaða.

Hann sigur, at tað tilfarið, sum brúkast kann, verður tikið frá og fyribils goymt í lægra partinum, sum stendur eftir, meðan alt tað tilfarið, sum ikki kundi brúkast til nakað, er burturbeint.

Stálkonstruktiónin undir stóru høllini verður tikin niður og seld. Fyribils eru stálbjákarnir tað einasta tilfarið úr húsinum, sum avsett er. Teir skulu flytast yvir á Skála, har teir eftir ætlan verða settir upp aftur í skýlinum, ætlanin er at gera kring fótbóltsvølin á Skála, sigur Áki Højgaard.

Men økið rundan um høsnahúsið er hampiliga stórt, og tað kann so brúkast til eitthvørt, heldur Áki Højgard. Tað kann bæði vera til at hava kríatúr gangandi á, ella fyri tann skuld til grundstykki, heldur hann.